VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Fleyr til gul av landnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 4 og 7 stig.



Veðrið hósdagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og ælingur, partvís vátaslettingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og norði og yvirhøvur turt sólglottar. Hitalagið millum frostmarkið og +3 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Leygardagin upp í stívt andøvsgul av norði, senni lot av ymsum ættum. Turt og sólglottar og hitalagið millum ÷1 og ÷4 stig. Sunnudagin veksur hann vindin av útsynningi og regn. Lýggjari.

Tíggjunda nýggjárskonsertin

Sunnukvøldið var tann árliga nýggjárskonsertin við Føroya Symfoniorkestri í Norðurlandahúsinu m. Eitt samstarv millum fýra partar, sum nú hevur tíggju ár á baki

KONSERT

Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo

Tvær nýggjárskonsertir við Føroya Symfoniorkestri og nýggjársmanskórinum vóru fyri fullum Norðurlandahúsi seinasta sunnudag
Mynd: Jens K. Vang

Nýggjárskonsertin er eitt siðbundið tiltak. Konsertin er á hvørjum ári, og tað er ongin ivi um, at áhugin er stórur millum fólk.

Í fleiri ár hevur ein eykakonsert verið og okkurt árið enntá tvær eykakonsertir. Í ár vóru so tvær konsertir, ein klokkan 16 og ein klokkan 19.30. Tað vil siga, at tilsamans 600 fólk fingu høvi at sita í Norðurlandahúsinum og njóta konsertina og tann góða stemningin, sum altíð er har.

Men allir føroyingar í Føroyum kunnu hoyra ella síggja konsertina, hóast bert 600 fáa pláss í Norðurlandahúsinum. Konsertin verður altíð varpað beinleiðis út í sjónvarpinum og útvarpinum.

Nýggjárskonsertin kann tí sigast at vera eitt gott úrslit av einum samstarvi millum fýra partar. Norðurlandahúsið, SvF, Úf og Føroya Symfoniorkestur.

Ongin ivi man vera um, at Norðurlandahúsið man vera tað hølið í Havn, sum egnar seg best til nýggjárskonsertina. Við tað at sjónvarp og útvarp taka konsertina upp, mugu tøkniligu viðurskiftini vera av teimum bestu. Og tað eru tey í Norðurlandahúsinum.

Gravgangurin eftir atgongumerkjum til nýggjárskonsertina er altíð stórur. Og í ár var onki undantak. Rættiliga tíðliga vóru øll 600 atgongumerkini til tær báðar konsertirnar vekk.

Sosialurin kemur við einum ummæli av konsertini í leygardagsblaðnum.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷15
Nuuk	÷6
Qaqortoq	0
Ammassalik	÷5
Saint John's	÷8
Halifax	÷5
Reykjavík	0
Seyðisfjørður	2
Tórshavn	4
Lerwick	4
Aberdeen	5
London	6
Tromsø	÷3
Bergen	–
Oslo	–
Stokkhólm	0
Keypmannah.	3
Helsinki	0
Moskva	÷4
Berlin	4
Warzawa	0
Kiev	÷3
Bukarest	1
Paris	10
Madrid	6
Róm	13
Malorca	15
Athen	10
Malta	15
Tunis	19
Beijing	1
New Dehli	17
Bangkok	28
Jakarta	28
Sydney	–
New York	2
Miami	18
Los Angeles	13
Meksikobýur	13
Panama	–
La Paz	10
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	29

LUFTTRÝSTIÐ

Eitt djúpt lágtrýst, 966 hPa. við Føroyar stendur mestsum í stað og grynnist.

Lágtrýstið við Føroyar fer spakuliga eystureftir og vestan fyri lágtrýstið rekur køld luft av norði móti Føroyum.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 12/01 kl. 06⁰⁰– 13/01 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 3,8°
Minsti hiti máldur í jan.: ÷8,8° - Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,8 mm – mált frá 12/01 kl. 06⁰⁰–13/01 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í januar: 76,2 mm

www.sosialurin.fo

VESTFALLSKYRRINDI

3. januar: Mánin longst frá jørðini
4. januar: Jørðin næst sólini
7. januar: Fullmáni
15. januar: Seinna kvarter
19. januar: Mánin næstur jørðini

Kelda: Almanakkin 2004

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
14. jan	11.27	—	10.27	23.01	10.42	23.16	01.08	13.27	02.08	14.27	09.42	22.16	08.42	21.16	11.42	—	00.23	12.42	11.12	23.46	00.08	12.27
15. jan	00.01	12.36	11.36	—	11.51	—	02.01	14.36	03.01	15.36	10.51	23.26	09.51	22.26	00.16	12.51	01.16	13.51	—	12.21	01.01	13.36
16. jan	01.11	13.47	00.11	12.47	00.26	13.02	03.11	15.47	04.11	16.47	—	12.02	11.02	23.25	01.26	14.02	02.26	15.02	00.56	13.32	02.11	14.47
17. jan	02.10	14.34	01.10	13.34	01.25	13.49	04.10	16.34	05.10	17.34	00.25	12.49	11.49	—	02.25	14.49	03.25	15.49	01.55	14.19	03.10	15.34

5 707265 100036 >